**Góði skúlaleiðari**

Hervið verða tit boðin við til ársins Pangea - Støddfrøði-kapping

Við okkara slagorði “Rokning sameinir”, er endamálið við Pangea Støddfrøði-kappingini at savna 3.-9. floks næmingar tvørtur um stað, samfelagsbólkar og útbúgvingarstøði, bjóða teimum av, og fáa tey at ásanna, at rokning eisini kann vera stuttligt. Á tann hátt ynskja vit at geva næmingunum møguleika at deila teirra royndir og gleðir við aðrar næmingar við at nýta rokning sum amboð. Við øðrum orðum ynskja vit at eggja og hugkveikja næmingarnar til rokning umframt at heiðra og løna teimum bestu við vinningum fyri teirra avrik - einki kveikir meir enn viðgongd.

<u>Tilmelding:</u>

Allir næmingar frá 3. - 9. flokk kunnu luttaka.

Lærarin meldar flokkin, ella teir næmingar, sum hava áhuga at luttaka, til. Hetta verður gjørt við at útfylla viðhefta skjalið, og senda tað til pangea.foroyar@gmail.com.

**Umráðandi: Lærarar senda sjálvir tilmeldingina/tilmeldingarnar við tí Tposti, sum teir ynskja, at vit senda uppgávurnar til.**

*(Um so er, at trupulleikar eru við at brúka viðhefta Excel-skjal til tilmeldingina, kunnu tit stovna egið skjal, og senda okkum tað.* ***Skjalið skal innihalda: navn á næmingi. floksstig, skúli, lærari, og lærarans Tpost)***

<u>**Freistin at melda til undanumfarið er 19. desembur 2023 kl 23:59.**</u>

<u>Undanumfarið verður hildið í tíðarskeiðinum 9. - 12. Januar 2024.</u>

Undanumfarið verður roknað á skúlunum. Uppgávurnar verða sendar beinleiðis til lærararnar við telduposti. Næmingarnir fáa 60 minuttir at rokna. Svarini verða send við Posta til:

Katrin Gullbein

Heiðavegur 3

100 Tórshavn

**<u>Hálvfinalan verður í Eysturskúlanum leygardagin 2. mars 2024.</u>**

Til ber at skipa fyri hálvfinalu sjálvi. Hetta skal tó verða samstundis, sum hálvfinalan í Havn. Um tit ynskja at skipa fyri hesum, setið tykkum í samband við Pangea-nevndina.

**<u>Finalan verður leygardagin 20. apríl 2024 í Norðurlandahúsinum.</u>**

Spurningar kunnu sendast til:

pangea.foroyar@gmail.com ella Facebook/Messenger.

Við vón um góða luttøku

Pangea-nevndin